# TB fingið nýggjan venjara

*Tvøroyrar Bóltfelag hevur fingið nýggjan venjara. Talan er um danan, Lynge Nielsen, sum í 1990 var venjari hjá fótbóltsfelagnum Royn í Hvalba*



*Eins og alla aðra staðni í landinum, eru tey á Tvøroyri eisini farin at fyrireika seg til fótbóltslandskappingina*

**Savnsmynd**

JÁKUP BOGI JOENSEN

Elsta fótbóltsfelagið í landinum, TB av Tvøroyri, hevur nú fingið nýggjan venjara til komandi kappingarár.

Talan er um danan, Lynge Nielsen, sum tó er gamal kenningur í føroyskum fótbólti. Hann var í 1990 venjari hjá fótbóltsfelagnum Royn í Hvalba.

Heri Mortensen, formaður í TB, sigur við Sosialin, at enn eru tó smálutir, sum endaliga skulu koma uppá pláss í sáttmálanum millum TB og Lynge Nielsen.

Formaðurin í TB ásannar tó, at hann í roynd og veru veit ógvuliga litið um komandi venjaran felagið hevur ognað sær.

-Samstarvaavtalan millum TB og Lynge Nielsen er komin í lag gjøgnum nakrar av eldru leikarunum í TB, sum minnast Lynge frá tíðini hann vandi Royn, sigur Heri Mortensen við Sosialin.

Á Tvøroyri, sum alla aðra staðni í landinum, eru fyrireikingarnar til komandi kappingarári fyri langari tíð síðani farnar í gongd og sum heild hevur formaðurin í TB góðar vónir.

-Vónirnar eru altíð góðar. Vit gjørdust nummar trý í næstbestu deildini í fjør, men í ár hava vit ætlanir um at koma enn longur upp á stigatalvuna. Spurningurin er bara, um vit klára at halda uppá sama fólki, sum undanfarna kappingarár, sigur Heri Mortensen.

Leysatíðindi hava seinastu tíðina gingið um, at Tórður Holm, sum seinasta kappingarár spældi fyri VB skal koma aftur til TB. Men sæmbart formanninum í TB, Hera Mortensen, hava teir ikki hoyrt nakað frá Tórði Holm. Men hann leggur aftrat, at Tórður og aðrir altíð eru vælkomnir í felagið.

Hvussu er og ikki, so er framvegis langt á mál, um Tvørámenn ætla sær at røkka somu hæddum, sum teir vóru á fyrr.

Tá var so at siga gerandiskostur at FM heitið endaði í Suðuroynni, men síðani seinasta meistaraheitið varð vunnið í 1987m hevur tað verið dekan ov langt millum snapsirnar.

# Stjørnan onga greipu

*Kyndil gav Stjørnuni ein ordiligan undir vangan, tá liðini bæði hittust í fyrru hálvfinaluni hjá kvinnunm sunnudagin. Tá liðugt var, vóru sjey mál á muni, og líkt er nú til, at Kyndilskvinnurnar standa við hálvumøðrum beini í finaluni*

JÁKUP MØRK

Kyndil-Stjørnan 25-18 (11-12)

Fyri stuttum var greitt, at Flemming Raben hevði sagt seg úr sessinum sum venjari hjá kyndilskvinnunum, og fram til hóskvøldið var eisini ógreitt, hvør skuldi hava ábyrgdina av bestu kvinnuliðnum hjá Kyndli.

Endin varð tó, at Bárður Johannesen, sum hevur eina fortíð á besta mansliðið felagsins, skuldi taka um stýrisvølin fyribils. Enn er kansa nakað tíðliga at siga, hvørja ávirkan hetta fær á liðið, men skal avrik hansara metast eftir dystin sunnudagin, er talan um eitt reint 13-tal.

## Uppsettar

Tað var nevnliga frá byrjan greitt, at kyndilskvinnurnar vóru rættuliga uppsettar til hendan dystin. Fyri viku síðani leiktu tær móti Neistanum, og í størsta orsøkin til tapið tað ferðina var, at tær á mótstøðuliðnum vóru nógv grammari eftir stigunum.

Soleiðis skuldi ikki vera hesuferð, og serliga í verjupartinum løgdu kyndilskvinnurnar nógv fyri.

Hetta kostaði tó nakrar útvísingar og nøkur brotskøst, men tað var eyðsæð, at hetta samstundis var við til at halda klaksvíkingunum burtur, soleiðis at tær ongantíð fingu spæl teirra at koyra.

Eisini hevði tað sera stóran týdning fyri gongdina í dystinum, at kyndilsliðið so at siga hvørja ferð fekk enda álopini við eini skotroynd, soleiðis at kontraspælið hjá Stjørnuni ongantíð kom at koyra. Júst hetta hevur annars verið eitt av sterkastu vápnunum hjá klaksvíkingunum.

Tað var tó ikki bert Bárður, sum var nýggju á venjarabeinkinum sunnudagin, tí á beinkinum hjá Stjørnuni sat eisini Rógvi Nielsen, sum nú er liðugur at útbúgva seg, og tískil er fluttur heim aftur til Føroya.

Ársins venjari seinasta ár nýtti heldur ikki langa tíð um gera vart við seg, tí eftir bert seks minuttum hevði hann rópt somikið nógv, at dómararnir góvu honum ostaflísina.

Orsøkin til ógvusligu rópini var helst tann, at Kyndil tá var í ferð við at vinna sær eina hampuliga leiðslu, men Stjørnan slepti ongan tíð takinum hendan hálvleikin, og tískil vóru tær á odda við einum máli, tá farið varð til hálvleiks.

## Hart arbeiði og Marita

Kyndilskvinnurnar løgdu fyri sum eitt óløgi í seinna hálvleiki, og áðrenn klaksvíksgenturnar høvdu skotið nakað mál, hevði Kyndil fingið fimm, og so var kósin sett.

Kyndilskvinnurnar sýndu eingi tekin um at taka tað róligt, og so hvørt, sum munurin vaks, gjørdust stjørnugenturnar alt meira ráðaleysar. Fyrstu 25 minuttirnar av seinna hálvleiki fekk Stjørnan einans trý mál, og tað man vera langt síðani, at tað hevur skorist somikið illa hjá teimum.

Orsøkirnar til hetta vóru tvinnar. Fyrst og fremst arbeiddu kyndilskvinnurnar ótrúliga hart í verjupartinum, og har umframt stóð Marita Hermansen í málinum.

Líkamikið hvussu klaksvíksgenturnar royndu, so fekk hon onkursvegna vart fyri, og uttan at taka munnin ov fullan, kann helst staðfestast, at hon var besti leikarin á vøllinum sunnudagin.

Í hinum endanum lá eisini væl fyri, og so hvørt, sum munurin vaks, vaks eisini sjálvsálitið hjá kyndilsleikarunum. Alla tíðina var roynt at trýsta móti verjuni, og var eitt lítið glopp at hóma, royndu leikararnir at fara ígjøgnum.

## Gloym greipuna

Endaliga støðan gjørdist so, at sjey mál vóru á muni millum liðini bæði, og hetta kann vísa seg at verða sera tungt hjá Stjørnuni at vinna aftur, tá liðini bæði hittast um tvær vikur. Sjálvur segði Rógvi Nielsen eftir dystin, at har var so einki at gera. Tær taptu móti kyndilsliðið, sum ikki var at kenna aftur, og at tapa móti einum betri liðið er eingin skomm.

Um møguleikarnir at koma víðari helt hann, at teir vóru ikki meira enn 20/80, men at tey sjálvsagt høvdu ætlanir um at spæla fyri teimum 20 prosentunum, eins og hann eisini minti á, at tær enn hava føroyameistaraheitið at spæla fyri har norðuri.

Heilt galið stendur sostatt ikki til hjá Stjørnuni, men ivaleyst var tað eitt skot fyri bógvin, at tað nú er líkt til, at tær kunnu gloyma alt um nakra greipu í ár.

## Dysturin í tølum:

Málskjúttar:
Kyndil: Ann Hansen 5, Palma Petersen 5, Lotte Sørensen 5 (3), Jensia Petersen 4, Beinta Sørensen 3, Jórun Ludvig 2, Frida Johannesen 1
Stjørnan: Vesna Tomajek 10 (8), Andriana Milodanovic 3, Simona Hansen 3, Annika Ljósstein 1, Joan M. Joensen 1
Brotskøst:
Kyndil 3, Stjørnan 8
Útvísingar:
Kyndil 6, Stjørnan 2
Dómarar úr Neistanum:
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen



Marita Hermansen stóð ein branddyst í málinum og var hon klárt besti leikarin á vøllinum. Við eina rúgvu av bjargingum helt hon máltalinum hjá Stjørnuni niðri.

**Mynd: Álvur Haraldsen**



# SÍ gjørdi ein vørr

*Flogbóltur: Sørvingar tóku Fleyr á bóli í fyrra hálvleiki av dystinum í Havn, men tað var kortini ikki nóg mikið tí Fleyr vann dystin*



Fleyr fekk ein hvøkk um vikuskifti, men at enda megnaðu teir kortini at basa SÍ

**Savnsvmynd**

SVEINUR TRÓNDARSON

Fleyr-SÍ 2-1

Tað gongur ikki altíð, sum prestur prædikar, og slett ikki sum ein sjálvrur hevði ætlað sær.

Leygardagin hevði oddaliðið í meistaradeildini hjá monnum vitjan av SÍ, og ikki var annað væntandi, enn at Fleyr fór at vinna ein lættan sigur, men so var kortini ikki. Teir máttu stríðast fyri tí, sum teir ætlaðu sær, og tað uppfataðu teir ikki fyrr enn fyrri hálvleikur var av.

Og tá var støðan 1-0 — til SÍ.

## Dovnir havnarmenn

Dysturin leygardagin var ein av teimum, har heimaliðið tók uppgávuna alt ov lætt. Tað var rættiliga skjótt, at tað sást, at teir ikki høvdu hug at gera meiri enn allarhægst neyðugt, men, samstundis sum hugurin at spæla ikki var tann stóri, fall úrtøkan í spælinum.

Hinumegin netið høvdu sørvingarnir fingið blóð á tonna, og við eitt sóðu teir møguleikan at fáa nakað burturúr hesum dystinum, sum teir annars ikki høvdu væntað.

Teir vístu vilja at vera við og tað eydnaðist teimum eisini. Teir lótu ongantíð Fleyr sleppa serliga langt frá teimum, og tá teir sjálvir høvdu sterkastu uppstilling frammi við netið fingu teir nógv burtur úr.

Fleyr vann fyrsta sett, men tað var bert við trimum eygum – 21-18, men tað sást á øllum brøgdum, at dysturin var ikki av, tí sørvingarnir vóru ikki langt frá, og so var.

Í øðrum setti gjørdu teir bart. Teir vunnu eitt sera javnt og spennandi sett við 22 stigum móti 20, og tá javnbrótaran vunnu teir eisini, so nú stóð brádliga 1-0 til SÍ, og tað var alt annað enn væntað.

Men tað var fult uppiborið, at SÍ hevði vunnið, tí fleyrleikararnir vístu seg ikki frá síni bestu síðu í fyrra hálvleiki, tí teir vóru dovnir og líkasælir.

## Vaknaðu úr dvala

Lagið var einki serligt á havnarmonnum tá hálvleikt var. teir lógu undir fyri sørvingum, sum spældu einfalt, men tað tyktist vera nóg mikið, tí teir vóru frammanfyri. Fleyr hevði roynt við fjø'lbroyttum spæli, men tað vísti seg ikki hanga saman.

Tá annar hálvleikur byrjaði var eingin ivi um, hvat av liðunum hevði størsta hugin at vinna. Særda havnarliðið hevði tikið seg saman og eftir lítlari løtu var Fleyr farið langt frammanfyri.

Triðja sett endaði eisini við greiðum sigri til Fleyr, sum nú tyktist vera komið aftur á beint.

Gongdin helt fram í fjórða setti, og í hesum báðum settunum kom rættiliga greitt til sjóndar munurin millum spæli hjá sørvingum og hjá havnarmonnum. Breiddin í spælinum hjá Fleyr er væl størri, og tí ber til at gera fleiri kombinatiónir enn onnur lið.

## Stórur munur til endans

Hóast tað eftir fyrra hálvleik sá út til at fara at gera ein spennandi dystur, so varð tað ikki so tá til stykkis kom. Fleyr vaknaði áðrenn ov seint var, og fekk spælið aftur á beint.

Seinasti javnbrótarin endaði við greiðum sigri til Fleyr, sum sostatt fekk togað ein 2-1 sigur til høldar.

Við sigrinum er stóra høvuðstaðarfelagið framvegis besta boðið til ein nýggjan meistara, men teir mugu taka seg saman, tí tað er ikki hvørja ferð, at teir sleppa at koma afturíaftur, sum teir gjørdu leygardagin. Klaksvíkingar lúra eftir teimum, og fara ikki at lata sær bjóða fleiri ferðir.

Í teimum báðum seinnu settunum var eingin ivi um, at Fleyr var betra liðið, og til tíðir vístu teir sera vakurt spæl í hesum báðum settum. Hjá sørvingum var tað bara at staðfesta, at teir hvødu fingið meiri enn teir kundu væntað sær, og tað vóru teir eisini glaðir fyri.

Til teirra rós, skal sigast, at teir bardust fyri sínum møguleika.

# Gudrid á øðrum plássi

*Flogbóltur: Kvinnurnar hjá Fortuna eru vaknaðar úr dvala, og um vikuskiftið vunnu tær á oddaliðnum úr DHG. Menninir hjá Fortuna orkaðu ikki so væl og teir taptu sín dyst móti DHG*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað gongur strálandi hjá Gudrid og Fortunu í bestu kvinnudeildini í flogbólti. Fyrr í kappingarárinum kom stígur í, men nú tykist ferð verða komin á aftur hjá teimum.

Um vikuskiftið var lokaluppgerð í Odense hjá bæði monnum og kvinnum.

Bæði liðini hjá DHG liggja á fremsta plássi, og tískil var væntandi, at tað kundi fara at gerast torført, at fáa fulla úrtøku úr dystunum.

## Gudrid og tær vunnu

Hóast væntandi var, at talan skuldi fara at vera um ein spennandi og drúgvan dyst, so sá ikki soleiðis út eftir fyrra hálvleik, tí har gjørdu Gudrid og tær stutta prosess. Tær løgdu hart út, og vunnu rímuliga lætt fyrra hálvleik.

Í seinna hálvleiki harafturímóti var ikki so lætt at koma til sigurs, tí oddaliðið í donsku meistaradeildini vildi fegin hava eitt orð at siga í hesum dystinum.

DHG fótaði sær aftur og fekk annan hálvleik til høldar, soleiðis, at nú var neyðugt við einum javnbrótara fyri at fáa dystin avgjørdan, og her var tað Fortuna, sum dróg longra stráðið. Tískil vunnu tær dystin 2-1, og eru nú javnar í stigum við DHG, hóast Fortuna hevur spælt ein dyst fleiri enn DHG.

Men tað er ikki eiti á spenningur Gudrid er vorðin partur av.

## Bárður tapti – enn einaferð

Hjá monnunum í Fortuna gekst einki serligt. Liðið hjá DHG er heldur ikki hvør sum helst, tí teir hava bara tapt tann eina dystin í ár – ímóti Fortuna.

Kortini var dysturin ikki heilt uttan spenning, tí javnbrótari mátti til í fyrra hálvleiki.

Men, sum Bárður sjálvur tekur til, so hevur DHG fleiri streingir at spæla upp á , og tí vunnu teir dystin 2-0.

Úrslitið av dystinum hevði tað við sær, at Fortuna varð liggjandi á næstaftasta plássi í bestu flogbóltsdeildini í Danmark, og har hava teir seks stig fyri, Men teir liggja rímuliga tryggir, tí niðafyri teir liggur Roskilde, men teir hava einki stig fingið í ár.

Sosialurin ynskir Gudrid og Bárði framhaldandi góða eydnu í donsku flogbóltskappingini.

# Bara fimm lið eftir

*Flogbóltur: So hendi tað aftur. Fleyr b er tikið úr kappingini og við tí eru bara fimm lið eftir. Nú má FBF bera so í bandi, at bara eitt lið úr hvørjum felag, kann spæla í bestu deildini*

SVEINUR TRÓNDARSON

Um vikuskiftið skuldu ÍF og Fleyr b spæla dyst sínamillum, men dysturin varð av ongum, tí um dagarnar frættist, at Fleyr b hevur tikið liðið úr kappingini.

Tað vil siga, at Fleyr ikki setir seg føran fyri at manna tvey lið í meistaradeildini hjá monnum, og tað hevur gingið tann vegin seinastu tíðina. Fleiri leikarar eru givnir – av ymsum ávum – og trupult hevur verið at fáa nýggjar leikarar til.

Úrslitið av hesum er, at tað nú bara eru fimm lið eftir í deildini, og tað merkir eisini, at allir dystirnir har Fleyr b stendur sum annað liðið, detta burtur.

## Óheppið

Tað má stigast vera stak óheppið, at eitt lið í meistaradeildini verður tikið úr kappingini, og tað talar ikki høvuðsstaðarfelagnum til rós, at tað enn einaferð er eitt av teirra liðum, sum verður tikið úr kappingini á henda hátt, tí hetta er nevniliga ikki fyrstu ferð.

Umtalan flogbólturin fær av slíkum er ikki serliga positiv, og tað er heldur ikki serliga positivt, at lið í ovastu deildini í eini ítróttargrein verður tikið úr kappingini.

Hugurin hjá yngri leikarunum at vera við í flogbóltskappingini hevur verið vaksandi seinnu árini, og tað er hugaligt, men tað er ein spurningur, um støður, sum henda, ikki kunnu skapa eina beint øvugta gongd, og tað vildi verið meiri enn spell.

Yngru leikararnir hava brúk fyri onkrum at síggja upp til, men tað er so verri enn so, at tað er at lið verða tikin úr kappingini.

## Broyting má til

Tá vit enn einaferð hava staðfest, at eitt felag ikki klárar at hava fleiri lið í ovastu deildini, so er eisini tíðin komin at rópa varskó.

Tað kann ikki vera meiningin, at tað skal vera undantakið heldur enn regulin, at flogbóltslandskappingin skal enda við eins nógvum liðum og hon byrjaði.

Men tíverri er tað komið fyri fleiri ferðir, og tí eigur FBF at bera so í bandi, at tað slepst undan slíkum. Ein møguleiki er at seta avmarking fyri tali av liðum í meistaradeildini niður til fimm, og ein annar er at siga, at bara eitt lið úr hvørjum felag kann leika í bestu deildini.

Grundgevingin fyri tí seinna er, at tað er betri at tað eru færri lið, sum dugur er í, enn fleiri, har tað eina – ella fleiri – fella burtur.

Í fjør var ÍF í meistaradeildini hjá momnnum við tveimum liðum, og hóast tað ikki skal takast nakað frá ÍF og fuglfirðingum, so var talan ikki um eitt sterkt lið – b-liðið. Kortini megnaðu teir at spæla árið at enda, og tað er til teirra rós.

Tí er at vóna, at FBF fer at bera so í bandi, at kappingin verður broytt, soleiðis at vit sleppa undan slíkum støðum, sum ístaðin fyri at menna flogbóltin, gera honum ónáðir.